

Marianne Marthinsen, fíggjarpolitisk talskvinna hjá norska javnaTalskvinnan hjá norska javnaðarflokkinum, Marianne Marthinsen, í fíggjarmálum, sigur seg ivast í um Oljugrunnurin klárar at tjena pengar uppá vedding í partafelagsmarknaðinum

# Ivast í um Oljugrunnurin tjenar tað hann sigur seg tjena

**Jógvan Hugo Gardar**

26.07.2015 - 14:03

Oljan.fo

Talskvinnan hjá norska javnaðarflokkinum, Marianne Marthinsen, í fíggjarmálum, sigur seg ivast í um Oljugrunnurin klárar at tjena pengar uppá vedding í partafelagsmarknaðinum. Nú vil hon, saman við eini samdari fíggjarnevnd, hava at grunnurin gevur politikkarunum eina meira gjøgnumgangandi og gjølliga frágreiðing av tí sum verður gjørt, skrivar Dagens Næringsliv.

Eg eri ikki vís í at Oljugrunnurin tjenar pengar uppá sín máta at umsita pengarnar uppá. Áðrenn eg kann koma til eina neyvari niðurstøðu, so er neyðugt at grunnurin vísir okkum

hvat sum veruligi kostnaðurin er av ávisum íløgum og hvønn váða tey hava sett, sigur Marthinsen, sambært Dagens Næringsliv.

Hon sigur at Oljugrunnurin er alt ov týdningarmikil til at Stórtingið kann lata tað vera upp til tilbildina at avgera um nakar og hvør sum tekur sær tíð og stundir til at rokna út hvat tað er sum grunnurin leggur fram.

Tað er av stórum týdningi at vit fáa eitt breitt orðaskifti um grunnin. Oljugrunnurin hevur stóran týsning fyri Noreg, og neyðugt er at finna fram til neyðugu karmarnar fyri grunnin komandi árini. Vit kunnu ikki stóla uppá at fólk av tilvild seta seg inn í tað sum verður lagt fram. Tí eru vit í fíggjarnevnd Stórtingsins samd um at heita á Fíggjarmálaráðið um at fáa Gjedrem-nevnina til eisini at hyggja eftir eftirlitispørtunum hjá grunninum, sigur hon.

Gjedrem-nevndin er í gongd við at endurmeta norska miðbankan, og ein partur av hesum er umsitingin av Oljugrunninum.